# STINGLAKSUR

***Aphanopus carbo***



**Felags fiskastovnur**
**Gagnfiskur**
**Botnfiskur/uppsjóvarfiskur**
**Elsti aldursgreinaði stinglaksur í eystara parti av Atlantshavinum: 24 ár**
**Longsti mátaði stinglaksur undir Føroyum: 115 cm**

## Lívfrøði

Tað er onki klárt vísindaligt prógv fyri, hvussu stovnsuppbýtið hjá stinglaksi er, men hypotesan er, at allur stinglaksur í eystara parti av Atlantshavinum er ein og sami stovnur. Í ICES verður stinglaksur við Føroyar viðgjørdur sum partur av einum felags stovni.

Stinglaksur verður lívfrøðiliga roknaður sum ein djúpvatnsfiskur, sum lond hava bundið seg til at fiska við serligum fyrivarni.



*Mynd 2. Stinglaksanytrur.*

### Útbreiðsla

Stinglaksur er um alt Atlantshavið, eisini mitt úti í við bankar og ryggir, suður til umleið 15°N (Mynd 1). Hann livir frá 200 m og niður á 1600 m dýpi ella djúpari.



*Mynd 1. Útbreiðsla av stinglaksi.*

Undir Føroyum er stinglaksur við bankarnar vestanfyri, vanliga har dýpið er millum 400 og 900 metrar og hitin er millum 6,5 og 9 stig.

Stinglaksur er bæði botnfiskur og uppsjóvarfiskur, um náttina er hann uppi í sjónum.

### Vøkstur

Stinglaksur veksur lutfalsliga skjótt í eystara parti av Atlantshavinum. Tann árligi vøksturin hjá stinglaksi longri suðuri (við Madeira) er umleið 8-10 cm um árið, til fiskurin er kynsbúgvin. Eftir hetta veksur hann seinni. Ein 5 ára gamal stinglaksur við Madeira er umleið 70-90 cm og ein 10 ára gamal umleið 100-130 cm. Stinglaksur verður sjáldan eldri enn 15 ár.

Aldurin hjá stinglaksi verður staðfestur við at telja árringar í nytrunum. Nytran á stinglaksi er lutfalsliga lítil (Mynd 2), og hon verður skorin í tunnar flísar fyri at síggja aldursringarnar betur, áðrenn hon verður lisin. Stinglaksanytrur eru torførar at aldurslesa. Í 2018 vórðu 77 nytrur av stinglaksi undan Føroyum aldursgreinaðar í Portugal. Miðallongd móti aldri fyri hesar 77 fiskarnar er víst í Mynd 3.




*Mynd 3. Miðlongd móti aldri, mátað av 77 stinglaksum av djúpum vatni undir Føroyum í 2015.*




*Mynd 4. Longd móti vekt mátað frá landingum í 2015-2018.*




*Mynd 5. Føðin í vekt í stinglaksamagum býtt í høvuðsbólkar árini 2014-2018.*

Longd móti vekt fyri allar støddir av landaðum stinglaksi sæst í Mynd 4. Miðalvektin á 75 cm langum og 100 cm langum stinglaksi í rundari vekt var umleið 0,5 kg og 1,4 kg.

### Kynsbúning

Tað serliga við stinglaksinum, sum verður fiskaður við Føroyar, er, at hann er óbúgvin, tvs. at hann ongantíð hevur gýtt. Tað sama er galdandi fyri stinglaks, sum verður veiddur í íslendskum øki og fyri ein stóran part eisini fyri stinglaks, sum verður veiddur vestan fyri bretsku oyggjarnar. Hypotesan er, at norðara økið er føði- og uppvakstrarøki hjá stinglaksi í eystara parti av Atlantshavinum.

Við Madeira gýtir í miðal helvtin av stinglaksinum fyrstu ferð, tá hann er um 110 cm til longdar.

### Gýting

Tað er ikki fingin gýtandi stinglaksur í føroyskum sjógvi. Gýtandi stinglaksur er fingin á djúpum vatni við Madeira og við portugisisku strondina.

### Yngul og ungfiskur

Rognkorn og larvur av stinglaksi eru ongantíð funnin í eystara parti av Atlantshavinum. Tann minsti stinglaksurin (eyðmerktur við DNA-kanning), sum vit vita um, var 10 cm langur. Hann var fingin í ein landnyrðing úr Cape Verde.

### Ferðing

Lítil vitan er um ferðing hjá stinglaksi. Hypotesan er, at stinglaksur í eystara parti av Atlantshavinum ferðast mest í sambandi við gýting og føðimøguleikar. Stinglaksur gýtir á djúpum vatni við Madeira, og ungfiskurin ferðast til norðara økið, millum annað við Føroyar, har føði- og uppvakstrarøkið hjá óbúnum stinglaksi er. Eftir nøkur ár ferðast stinglaksurin suður til portugisisku strondina, har hann støðast eina tíð, til hann fer enn longur suður til gýtingarøkið. Hetta ferðingarmynstrið er tó enn bert ein hypotesa.

### Føði

Føðin hjá stinglaksi hevur víst seg at verið fiskur, t.d. svartkjaftur, lindjór, t.d. høgguslokkur, og krabbadjór (Mynd 5). Tað er trupult at kanna føðina hjá stinglaksi, tí rættiliga ofta eru magarnir tómir, og ofta er magin viðvendur, tá stinglaksurin kemur upp á dekkið.

## Veiða

Heildarveiðan av stinglaksi undir Føroyum síðani 1988 er víst á Mynd 6. Føroyska fiskaríið á djúpum vatni byrjaði seint í 1970-unum sum eitt blandingsfiskarí av kongafiski, blálongu, langasporli og stinglaksi. Beinleiðis fiskarí eftir stinglaksi byrjaði í 1989 sum úrslit av betri reiðskapi og betri hagreiðing av fiskinum. Síðani 1993 og fram til dagin í dag hava nakrir djúpvatnstrolarar fiskað stinglaks, antin ávísar tíðir á árinum ella gjøgnum alt árið. Høvuðsfiskaríið er í bankaøkinum í ein útsynning úr Føroyum og á Wyville Thomsonrygginum.

Frá 1989 til 2000 lá veiðan av stinglaksi millum 70 og 430 tons, men síðani 2000 hevur veiðan verið oman fyri 500 tons av stinglaksi í føroyskum øki (Mynd 6). Tá stinglaksaveiðan var í hæddini árini 2002-2003 og 2008, var hon 1600-1900 tons. Í 2013-2016 hevur veiðan ligið




*Mynd 6. Heildarveiðan av stinglaksi undir Føroyum 1988-2018 í rundari vekt.*



*Mynd 7. Longdarbýtið í stinglaksaveiðuni undir Føroyum í 2018. Longdirnar eru bólkaðar fyri hvørjar 2 cm, tvs. at bólkurin 70 cm er stinglaksur, sum er 70 og 71 cm.*

um 700-760 tons, men er minkað til 520 tons í 2017 og 560 tons í 2018. Síðani 2013 er tað bara ein trolari, sum hevur loyvi til beinleiðis at fiska stinglaks.

Longdarbýtið í stinglaksaveiðuni undir Føroyum í 2018 er víst á Mynd 7. Meginparturin av stinglaksinum í veiðuni var millum 84 og 100 cm langur og 5-8 ára gamal. Miðallongdin var umleið 90 cm.

Á landingarmiðstøðunum kring landið verður stinglaksur bólkaður í tveir støddarbólkar, alt eftir vekt (Talva 1). Líka nógv verður landað av báðum støddarbólkum.

*Talva 1. Umrokningartalva út frá støddarbólkum. Virðini byggja á tøl fyri árini 2014-2018. Aftasta kolonnan sigur, hvussu stórur partur av fiskinum í ymsu støddarbólkunum væntandi hevur gýtt minst einaferð.*

| | Kruvd vekt (kg) | Aldur (ár) | Longd (cm) | Búgvin |
|---|---|---|---|---|
| Stødd 1 | 1,5+ | 7-10+ | 96-108+ | 0% |
| Stødd 2 | <1,5 | 4-8 | 84-99 | 0% |

## Stovnsmeting

Ein stovnsmeting verður gjørd fyri felagsstovnin av stinglaksi við Føroyar og stinglaks longur suðuri. Afturat stovnsmetingini kunnu tøl frá ”veiðu upp á roynd” (cpue) nýtast til at geva eina ábending um, hvussu støðan er hjá stovninum í føroyskum øki. Fyri stinglaks hava vit cpue-tøl frá føroyskum trolarum, sum beinleiðis royna eftir stinglaksi (hál, har veiðan av stinglaksi er størri enn 30% av samlaðari veiðu) (Mynd 8). Veiða upp á roynd fyri stinglaks er í miðal 245 kg/tíma. Í 2013-2015 var veiða upp á roynd meir enn dupult so stór, millum 450 og 510 kg/tíma. Í 2016 til 2018 er veiða upp á roynd minkað niður í 250-300 kg/tíma.

Í ICES verður stinglaksur við Føroyar (ICES øki 5.b) viðgjørdur saman við stinglaksi longur suðuri (ICES økjunum 12.b, 6 og 7). Stinglaksastovnurin verður býttur í tríggjar stýringseindir (management units). Ein eind er trolfiskiskapur eftir stinglaksi í norðara økinum, ein eind er fiskiskapurin við línu í sunnara økinum, og so er triðja eindin restin av økinum, har onki beinleiðis fiskarí er eftir stinglaksi.

Ein stovnsmeting av stinglaksi (1999-2017) í eystara parti av Atlantshavinum, tvs. fyri alla tríggjar eindirnar saman, vísir, at veiðutrýstið er minkað síðani 2002 og er lágt nú. Stovnsstøddin er støðug.

ICES-tilmælið gevur eina samlaða veiðu, sum so verður býtt á tær tríggjar eindirnar. ICES mælir til eina samlaða veiðu upp á 5.914 tons pr. ár fyri árini 2019 og 2020. Býtið millum eindirnar er 2.812 tons í norðaru eindini, har Føroyar eru við, 2.735 tons í sunnaru eindini og so 367 tons í triðju eindini.



*Mynd 8. Veiða upp á roynd av stinglaksi hjá trolarum undir Føroyum 2000-2018.*


**Keldur**

Fariras, I. 2018. Age reading of Black scabbardfish otoliths. Report.

ICES, 2018. WGDEEP 2018.

ICES, 2018. Advice black scabbardfish.

Mouritsen, R. 2007. Fiskur undir Føroyum.

Jákupsstovu, S. H. í, 2004. Fiskiskapur við Føroyar í 100 ár. Úrdráttir úr hagtølum frá ICES.


Ábyrgdarfrøðingur: Lise H. Ofstad